

*ANE LAN (N): "Europe" - video 4:00 min (2004)*



*MADELEINE PARK (S): "The beauty of it all" Installation (2006)*

# Á TÍÐARLEYSARI FERÐ UTTAN MIÐ

*Sigurður Gylfi Magnússon*

Umleið miðskeiðis í seinastu áratíggjum av farnu øld fór eg saman við góðum vinfólkum at ferðast til eina lítla bygd, Gjøgur, norðalaga í Strandasýslu á Vestfirðum í Íslandi. Summar var við fagrasta veðri. Húnaflóði uttan fyri Gjøgur var fullur av ísi og rekaviðurin sløgdist við strendurnar. Eg var beint afturkomin til Íslands eftir tíggju ár í USA, og henda ferð mín ávirkaði meg sterkt. Eg var fullur av bjartskygni um landsins møguleikar, men samstundis óttaðist eg ta lagnu, ið lá fyri framman. Náttúran tóktist kørg, jørðin lítið fruktbar, men eg hugsaði, at eitt fólk, ið hevði lívbjargað sær undir hesum korum, uttan iva fór at klára seg. Hesi fólk kundu vinna á øllum trupulleikum.

Men hin fremmandi, ið kemur higar at ferðast, varnast, at her býr ikki nógv fólk longur. og at bygdirnar fækkast í tali. Slíkt vekir iva hjá øllum, ið hugsa um lív og framtíð í hesum smáu bygdunum, men eisini øllum landinum.

Seinni kom eg at ferðast nógv í Strandir saman við vísum monnum. Teir ferðaðust ikki í skipaðum ferðalag, men skrivaðu upp sera nágreiniliga í meira enn eina øld, tað teir gjørdu og hugsaðu. Á tann hátt kundi eg fylgjast við teimum eina langa ferð; eitt nú kundi eg steðga á hjá teimum á garðinum Tindi í sóknini Kirkjubólshreppur eitt kvirt vetrarkvøld onkuntíð miðskeiðis í seinna helmingi nítjandu aldar. Dagbøkur og annað, ið brøðurnir Halldór og Niels Jónssynir á garðinum Tindi høvdu skrivað, gjørdu, at eg nógv betur kundi læra meg at kenna Strandasýslu enn á fyrstu ferð míni. Nú kom eg við niðan á heiðina og rann millum bygdir: "Kristjan í Tungu kom framvið á veg suður til Kveingrjót, og Nilli fylgdi honum út á eggina og taldi fet síni heimaftur, og tey vóru 14585. Gvendur í Sel kom í dag og skuldi suðureftir, opg faðir fór við honum til Húsavíkar. Leifi kom aftur kl. 7.30 um kvøldið og steðgaði 12 tímar og 25 minuttir. Nilli fór avstað klokkan 11.30 fyrrapartin, kom aftur kl. 6 um kvøldið. Faðir koma aftur við tí nýggja (blaðnum) Ísafold.

Saman við mínum tíðarleysu vinum havi eg ikki bert fingið innlit í samfelagsviðurskiftini í Stranda sýslu í nítjandu øld, men eg havi fingið betri fatan av teimum møguleikum, hesar smáu bygdirnar hava frameftir. Eg haldi, at søgan hjá íslendska fólkinum, og herímillum vanligir menn sum Haldi og Nilli, kann læra okkum at loysa trupulleikarnar fyri framman, hvønn lut mentanin í útjaðaranum fer at fáa í hugsunarháttinum í framtíðini og heimsborgaranna ímyndingum um okkara hvíldarleysu ferð. Brøðurnir stóðu fyri stórum avboðingum, so sum hvørt attarlið hevur staðið, og tað eydnaðist teimum á sama hátt sum teirra forfedrum, at bera ta ábyrgd, ið fylgir við at vera íslendingur. Í staðin fyri at stinga í sekkin og fara, fettu teir sær á og bardu seg fram í storminum. Teirra søga gevur okkum fyrimyndina at taka við avbjóðingunum og líta fram móti nýggjari landtøku. Úr hesum sjónarhorni havi eg skrivað mínar bøkur og fingið hugskot frá fólki, ið livdu eitt heilt annað lív enn tað, eg kenni úr samtíðini, og eg vóni at tær skula fáa eins stóra ávirkan á lesararnar, sum handritini hjá brøðrunum høvdu á meg.

Mentanin í útjaðaranum er full av frásagnum um fólk, ið baksaðust undir heilt øðrum umstøðum. Hesi fólk skaptu tey komandi ættarliðini – 20 aldar menniskjuni – tey ættarliðini, ið eiga størsta lutin í at skapa verandi samfeløgini í 21. øld.

Heimurin eigur at kunna læra okkurt av teirra frásagnum og royndum.

• • • •